# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Útlendingamálið á tingborð

Løgtingsmálið um uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi "lov for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse" fær kaldliga móttøku frá stóru fakfeløgunum í Samtaki. Bakstøðið fyri uppskotinum er trotið á arbeiðsmegi, og samgongan hevur tí sett sær fyri at gera munagóð átøk á málsøkjum, sum viðvíkja útlendingum í Føroyum. Men hetta tekur tíð eitt nú at yvirtaka økið, og ríkislógartilmælið er bert at meta sum ein fyribilsloysn. Lógarbroytingin fevnir bert um ES borgarar, og tí verða reglurnar fyri onnur enn hesar tær somu, sum nú eru galdandi.

Hóast uppskotið bert er ein fyribilsloysn, so er hetta enn eitt av mongum dømum um, at altjóðagerðin er yvir okkum. Eitt eyðkenni við altjóðagerðini er, at alheimurin verður ein og sami arbeiðsmarknaður. Hetta er galdandi uttan mun til formligar reglur ella avtalur. Har formligar reglur forða arbeiðsmegi frítt at fara, ja, so verða bara sjálv arbeiðsplásini, altso virkini, flutt til eitt nú láglønarlond í Fjareystri. Hetta er sostatt einki einfalt mál, sum liggur á tingborði. Arbeiðsgevararnir vilja hava málið loyst, tí teimum trýtur arbeiðsmegi í ólukkumát. Trý av okkara stóru fakfeløgum mæla hinvegin Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið um at gera tað lættari at fáa útlendingar til Føroyar.

Feløgini í Samtaki óttast avleiðingarnar og vilja sjalvsagt hava at vita, hvat ið hendir, um støðan á arbeiðsmarknaðinum knappliga broytist. Búskaparliga dregur hann á luftina um allan vesturheim, so tað er væl skiljandi, at feløgini stúra fyri avleiðingunum. Feløgini fýlast á trótandi avleiðingametingar, men hinvegin mugu vit ásanna, at tað er mestsum ógjørligt at koma við haldgóðum metingum al tann tíð, vit ikki kenna framtíðina. Samtak reisir nakrar týðandi spurningar, sum landsstýrið má fyrihalda seg til, tí teir snúgva seg um at tryggja, at teir útlendingar sum koma til Føroya at arbeiða, hava sømulig arbeiðskor. Eisini verður víst á vandan fyri mismuni millum útlendska og føroyska arbeiðmegi. Hetta kann skapa misnøgd og illvilja móti útlendingum, og hetta má ikki henda í Føroyum. Mótmælið hjá teimum trimum feløgunum ber dám av samhaldsfesti við útlendska so væl sum innlendska arbeiðsmegi. Landsstýrið má tí taka hetta í størsta álvara og fara í dialog við bæði Samtak og Vinnuhúsið, og so er spuringurin um ikki hetta mál ikki bara kann bíða til øll útlendingalóggávan er yvirtikin um eitt ár.

**Sosialurin**

## Óumhugsað reaktión ímóti at flyta fakmørk uppeftir?

**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður



**- lat okkum heldur síggja tað sum eina felags avbjóðing enn eina hóttan**

Eg havi skotið upp, at vit fara at fáa avtalur í lag um at flyta fakmørkini í sjúkra- og heilsurøktini uppeftir, nú fakligi førleikin á økinum er lyftur munandi við hægri útbúgvingarstigum.

Læknarnir eru blivnir meir og meir spesialiseraðir á meira smølum serlæknaøkjum.

Samstundis eru sjúkrarøktarfrøðingar lyftir upp á hægri fakligt førleikastøði við bachelor-útbúgvingini og røkka inn á ávís øki, sum higartil hava verið ein partur av tí breiða virkisøkinum hjá læknunum.

Og so er eisini ein nýggjur røktarfakligur yrkisbólkur komin upp, við at heilsuhjálparar nú kunnu uppstígast til heilsurøktarar við hægri fakligan førleika gjøgnum spildurnýggju útbúgvingina sum heilsurøktarar.

Tað hevði verið meiningsleyst at latið sum onki, meðan alt hetta hendir – ella at sett seg upp ímóti at gagnnýta teir fyrimunir, sum hetta gevur fyri betri fyriskipan av viðgerðar- og røktarfakliga arbeiðinum á sjúkrahúsunum ella aðrastaðni á heilsu- og almannaøkinum, t.d. í eldrarøktini.

Tí havi eg boðað frá, at eg vil taka stig til at fáa avtalur í lag við avvarandi fakbólkar, hvussu vit kunnu flyta mørkini uppeftir. Eg haldi tað er bæði fakliga progressivt og rationelt. Haldi tað t.d. vera so upplagt, at við teirra hægri fakliga førleika mugu vit gagnnýta sjúkrarøktarfrøðingarnar nógv meir, enn at binda henda yrkisbólkin niður til ikki at kunna fáast við annað enn røkt – har eru jú ikki bara allar teir heilsufremjandi uppgávurnar men givið eisini ávísar viðgerðandi funktiónir.

Tí undrist eg stórliga yvir tað ógviliga negativa aftursvarið frá forkvinnuni í Sjúkrarøktarfrøðingafelagnum. Og tá hon haraftrat fer so langt sum at siga, at "sjúkrarøktin á Landssjúkrahúsinum er í vanda", haldi eg tað vera eina óumhugsaða og yvirspenta reaktión hjá Vár í Gong.

Fyri tað fyrsta verður talan ikki um at "sjúkrarøktarfrøðingar skulu víkja" fyri øðrum. Fyri tað næsta verður talan ikki um, at nakar annar fakbólkur skal yvirtaka ábyrgdina av røktini. Og fyri tað triðja verður ikki talan um flyta fakmørkini, uttan at teir avvarandi fakbólkarnir eru við í arbeiðinum at seta tey nýggju mørkini fyri virkisøkini. Hetta skulu vit í felag gera greiðar avtalur um.

Tað undrar meg eisini, at Vár heldur hetta vera nýggjar tankar hjá mær, sum hon hevur hoyrt og lisið nú um dagarnar. Tí um hon leitar í sítt egna fakblað, Vøku, tvey ár aftureftir, so kann hon har finna gestarøðu mína frá aðalfundinum hjá Sjúkrarøktarfrøðingafelagnum 18. mars 2006 – ella um hon var á aðalfundinum, so hevði hon hoyrt meg boða frá hesum longu tá, m.a. í hesum broti úr røðu míni:

"Til tann fyrra spurningin um hvat útviklingurin fer at merkja fyri tykkum sum fakbólk, so meti at tað er umráðandi, at vit í framtíðarinnar sjúkrahúsverki gagnnýta teir fyrimunir, sum støðugt hækkandi førleikastøði hjá sjúkrarøktarfrøðingum hevur við sær, serliga tá ið atlit verða tikin til manglandi starvsfólkaresursir í heilsuverkinum sum heild. Hetta krevur tó, at fakmørkini skulu flytast – og tað vil siga flytast uppeftir. Her hugsi eg millum annað um, at kvalifiseraðir sjúkrarøktarfrøðingar yvirtaka nakrar funktiónir frá læknunum, t. d. standardiseraðar viðgerðir, ið samstundis eru meira avbjóðandi fyri tykkum sum fakbólk, og so lata nýggju heilsurøktararnar taka sær av lættari røktaruppgávum, ið sjúkrarøktarfrøðingar vanliga hava tikið sær av. Hetta er ein broyting, ið t.d. er framd longu í dag á fleiri av teimum størru sjúkrahúsunum í Danmark".

Eg haldi vit skulu síggja henda møguleikan fyri at flyta fakmørkini uppeftir sum eina avbjóðing og ikki sum eina hóttan. Lat okkum í felag tosa saman um, hvørjir møguleikar eru, og hvussu hetta best kann lata seg gera, við fullari virðing fyri hvørjum øðrum og fyri røktarfakligu dygdini einsvæl og ábyrgdini.

## Hans Pauli Strøm hevur misskilt nakað heilt grundleggjandi

**VÁR Í GONG**
forkvinna
Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar



Landsstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hevur misskilt nakað heilt grundleggjandi, nú hann sigur, at uppgraderingin og menningin av sjúkrarøktarfrøðisútbúgvingini inniber, at sjúkrarøktarfrøðingar kunnu átaka sær alsamt fleiri læknauppgávur.

Sjúkrarøktarfrøði er, eins og læknayrki, eitt sjálvstøðugt yrki. At sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingin er fyri støðugari menning, er ein neyðug gongd í ein hvørji professión fyri at menna yrkið og ikki fyri at átaka sær uppgávur fyri aðrar starvsbólkar. Hendan menning í yrkinum og útbúgvingini er ikki fyri at gera sjúkrarøktarfrøðingar til hálvar læknar, men fyri at menna sjúkrarøktaryrkið. Endamálið við hesum vil altíð vera at gerast alsamt betur at veita sjúkrarøkt við sjúklingsins lið. Hetta er grundarsteinurin í sjúkrarøktarfrøðini.

Felagið heitir á Hans Paula Strøm, landsstýrismann, um ikki at blanda seg í defineringina av sjúkrarøktarfrøðini, tí útsagnir hansara síðstu dagarnar hava víst, at har hevur hann als einki innlit.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.